Løgmaður:

# Stovnleiðarar skyldu at halda játtan

**-Eg eri samdur við Páll á Reynatúgvu so langt, at tað er neyðugt, at tú hevur eina stýring á nýtsluni, at tú veit, hvat hendir og hvat tú brúkar pengarnar til. Tú kanst ikki bara siga, at heimahjálpin krevur meira pengar og so játtar tú meiri pengar sigur Anfinnur Kallsberg, løgmaður**

FÍGGJARLÓG
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Løgmaður kemur nú landsstýrismanninum í almannamálum, Páll á Reynatúgvu til hjálpar. Eftir at landsstýrismaðurin legði rættiliga kontant út í loftmiðlunum herfyri við at sáa iva um fíggjarliga førleikan hjá leiðarunum í heimarøktini vístu somu leiðarar atfinningunum aftur. Anfinnur Kallsberg, løgmaður svaraði í farnu viku fyrispurningi í tinginum um hetta mál og hevur Sosialurin spurt hann, um júst málið við játtanunum til heimarøkt og heimahjálp ikki liggur sum ein tikkandi bumba undir samgonguni!

- Fyri mær er hetta ikki nakað nýtt við heimahjálpini. Tað er á hvørjum tí einasta ári, tá tú kemur út til hesa tíðina, so hevur heimarøktin brúkt teir pengarnar hon hevur fingið. Í 2003 er játtanin til heimahjálpina 12 mill. kr. Hægri, enn hon var í 2002. Tað er ein veldug uppprioritering uppá eini 12 til 13% eftir einum ári. Vit høvdu júst hetta sama problemið í fjør og árið fyri osfr. Tað hendir hvørja ferð, at man fær eina eykajáttan. Í hesum árinum hevur man fingið 12 mill. kr. aftrat til at brúka eisini til nýtt virksemi, sum ikki er byrjað. Kortini mangla pengar í. Tvs. at hetta er ein tænasta, sum accelerar við eini ferð, sum er langt omanfyri tað, ið annars er meðaltalið fyri samfelagið.

- Men kann tað góðtakast, at tað ikki verður vaskað hjá teimum gomlu heima?

- Tey gomlu hava brúk fyri hjálp og fáa eisini ta tænastu, sum skal til. Her hava vit kanska ein annan trupulleika. Vit eisini hevur eitt heilsuverk, sum skal hava sínar pengar. Eitt heilsuverk, sum skal virka, uppdaterast og taka nýggja tøkni í brúk. Og har hevur man møguleikan fyri at útskriva sínar sjúklingar kanska fyrr enn áður, tí tað situr ein onnur skipan og tekur ímóti.

Løgmaður sigur víðari, at tað, sum sker í eyguni, er, at heimahjalpin hevur ongantíð klárað at hildið sína játtan, og tí hevur hvørt ár verið neyðugt, tá tað kemur til september, at fáa eina eykajáttan.

Hann heldur eisini, at tá man fer frá 84 mill. til 96 mill. eftir einum ári, og tað er júst sama skilið, so ruggar ikki rætt. Og hevði tú sett 124 mill. av til heimahjálpina, hevði tú tá ikki havt júst sama skilið spyr løgmaður!

- Men um so er, at nógv fleiri fólk tørva hjálp við hús, er tað so ikki rætt at lata teimum hana?

- Tað er spurningurin, um tað er hetta málið snýr seg um. Eru tað fleiri brúkarar inni í myndini og er tað so: hví eru tað fleiri? Og er tað tí, at tað er ein annar myndugleiki, sum átti at tikið sær av hesum, ið er sloppin undan teimum, eitt nú sjúkrahúsverkið spyr løgmaður og heldur fram:

- Hví eru nógv fleiri brúkarar í dag enn í fjør. Hví røkkur ein hækkan av heimahjálpini ikki longur enn til tað hon gjørdi í fjør? Eru tað 12% fleiri brúkarar í skipanini. Eru føroyingar blivnir so nógv vánaligari uppá eitt ár? Tað krevur eina gjølliga analysu, áðrenn man leypir aftaná og sigur, at man hevur brúk fyri meira pengum.

## Samdur við Páll

- Tekur tú harvið undir við Páll á Reynatúgvi, sum sigur, at leiðararnir í heimahjálpini hava ikki nóg gott fíggjarligt innlit?

- Eg eri samdur við Páll á Reynatúgvu so langt, at tað er neyðugt, at tú hevur eina stýring á hesi nýtsluni, at tú veit, hvat hendir og hvat tú brúkar pengarnar til. Tú kanst ikki bara siga, at heimahjálpin krevur meira pengar og so játtar tú meiri pengar.

- Er so fíggjarliga stýringin í heimarøktini ov vánalig?

- Er tað soleiðis, at man hevur brúkt eina játtan, sum er 12% hægri enn í fjør, og man hevur brúkt hana nógv fyrr enn í fjør, so er periodiseingin ikki í lagi.

Ein og hvør stovnsleiðari í hesum landinum hevur ábyrgdina av, at játtananin røkkur fyri alt árið.

- Men hvat nú um politikarnir hava lagt upp til eina órealistiska játtan?

- Tað er altíð ringt at halda eina játtan. Men tað er skyldan og ábyrgdin hjá stovnsleiðarum at gera tað. Óansæð.

Løgmaður vísir til uppsagnir í Strandferðsluni, sum nettupp stava frá tí, at man er noyddur til at halda eina játtan.

- Spyr stovnaleiðarar kring landið, um teir fáa nokk av pengum, og teir svara allir sum ein nei. Men tað er so, at man stýrir við eini fíggjarlóg og fær nakrar fíggjarligar karmar at abeiða innan fyri og so er tað sjálvandi uppgávun hjá teimum, sum hava ábyrgdina at halda seg innan fyri hesar karmar.

Løgmaður vísir á, at løgtingið púra greitt hevur sagt, at tað kemur ikki uppá tal við eini eykajáttan. Tað hevur landsstýrið at fyrihalda seg til. Tað vit í besta føri kunnu gera er at flyta pengar frá einum øki til eitt annað. Tað er somikið budgeterað, at tað finnast ikki pengar at flyta til onnur øki.




# Evran styrknað eftir G7 fundin

MARKNAÐARRÁK

Um vikuskiftið hevur verið G7 fundur í Dubai, har m.a. gjaldoyrastøðan í heiminum hevur verið umrødd. Umframt Kina, fekk eisini Japan toyggið fyri teirra gjaldoyrapolitikk. Í seinastuni hevur Japan dúgligani strítst fyri, at yennurin ikki skal styrkna mótvegis dollaranum. Á fundinum var niðurstøðan tann, at gjaldoyru skulu flóta meira frítt og skulu samsvara búskaparligu støðuni í londunum. Niðurstøðan fekk stóra ávirkan á yennin, ið er fallin munandi eftir fundin. Lutfallið millum evruna og dollaran er eisini ávirkað av fundarniðurstøðuni, og seinastu vikuna er evran hækkað úr 112,84 í 114,75 mótvegis dollaranum. Krónan er hækkað samsvarandi.

Broytingin í evru-dollara kursinum er stimbrandi fyri amerikanska búskapin og tálmandi fyri evropiska búskapin, og eftir G7 fundin, eru evropisku renturnar tískil falnar. Um evran heldur stigið ella hækkar meira, økist sannlíkindið fyri einari evropiskari rentulækking.

Viðvíkjandi búskaparligum uppgerðum, gjørdist farna vika í ávísan mun ein endurtøka av næstseinastu viku. Flestu uppgerðirnar úr USA vístu eina heldur laka gongd, og millum annað kann nevnast, at kjarnuprísvøksturin fall úr 0,2% í 0,1% í august. Tosið um vantandi prísvøksturin í USA vil tískil stundum ávirka virðisbrævamarknaðirnar. Seinastuni tríggjar vikurnar eru lánsbrævarentur sum heild falnar, men umframt at heldur lakari búskaparligar uppgerðir hava viðført hetta, er fallið eisini ein mótrørsla í samband við sera ógvusligu hækkingarnar, ið eru farnar fram síðani miðjan juni.

Viðvíkjandi búskaparligum uppgerðum, verður hendan vikan friðarlig, og ikki fyrr enn hósdagin verða tøl av týdningi kunngjørd, sum kunnu geva eina ábending um støðuna í týdningarmikla USA. Tískil metur Marknaðarrák, at gjaldoyrastøðan eftir G7 fundin kann ávirka rentugongdina stóran part av hesi vikuni. Nýggja gjaldoyrastøðan kann trýsta renturnar eitt vet niður afturat, men sum frálíður vilja búskapirnir aftur vísa styrki soleiðis, at renturnar aftur hækka.

Eftir at partabrøv hava staðið seg sera væl í seinastuni, kann væntast, at hesi vera óstøðug næstu vikurnar, til virkir í USA seta roknskaparkunngerðirnar fyri 3. ársfj. í gongd. Roknskapirnir fyri bæði 1. og 2. ársfj. vóru sum heild góðir og grundlag er fyri, at góða gongdin á hesum økinum heldur fram. Fyri langtíðar íleggjaran, eru møguleikar í løtuni at finna á partabrævamarknaðunum.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,72% | -0,10% |
| 5 ára lánsbræv | 3,54% | -0,11% |
| 10 ára lánsbræv | 4,34% | -0,06% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 248,5 | -1,6% |
| OMX, Svøríki | 592,6 | -1,8% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.495,3 | -0,4% |
| S&P 500, USA | 1.036,3 | 2,1% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,81 | 0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 164,50 | -0,4% |
| Norrøn Partabrøv | 70,13 | 1,0% |
| Altjóða Partabrøv | 76,32 | 2,4% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 647,67 | -1,6% |
| EUR | 742,75 | 0,0% |
| GBP | 1.066,33 | 1,2% |
| NOK | 91,00 | 1,3% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Elsebeth Holm 60



Mánadagin 22. september fylti Elsebeth Holm í Klaksvík 60 ár. Hon varð fødd í Keypmannahavn, dóttir Olgu Kalsø, ættað av Heyggi á Húsum og seinni gift við Haldor Holm. Olga og Haldor høvdu bakarí í Klaksvík í mong ár. Tey fingu sonin Aksel, men hann doyði 19 ára gamal í 1972.

Elsebeth gekk í Nunnuskúlanum í Havn 1951-52, men annars gekk hon í skúla í Klaksvík, har hon tók millumskúlaprógv í 1959.

Í 1958 var Niels Pauli Danielsen vikarur í skúlanum í Klaksvík, og har møttust hann og Elsebeth fyrstu ferð. Tey giftust í Klaksvík í 1962. Tey búðu í Keypmannahavn, til Niels Pauli hevði lokið prógv sum gudfrøðingur. Tá fluttu tey heim, og hann tók við sum prestur á Viðareiði. Í Danmark hevði Elsebeth ymisk arbeiði, hjá Forlagnum Fremad og í bókhaldinum hjá einum bilsølumanni.

Eftir 5 ár á Viðareiði fluttu prestahjúnini inn á Skálafjørðin, á Gjaranes fyri Innan Glyvur. Í 1979 tók Niels Pauli við sum prestur í Klaksvík, og tey búsettust á Brekku.

Elsebeth og Niels Pauli eiga tveir synir. Hilmar er føddur í 1963 og Olgar í 1966. Hilmar er streymverksfrøðingur og hevur lampubúð í gamla bakarínum hjá Haldor. Hann er eisini býráðslimur. Hilmar er giftur við Elini Østerø úr Klaksvík.

Olgar er bankamaður, men tey flestu kring um í landinum munna kenna hann betur sum tann frálíka álopsleikaran hjá KÍ í mong ár. Hann er giftur við Kristiannu Bjartalíð í Klaksvík.

Elsebeth var heima, til synirnir vóru vaksnir og giftir. Í 1989 fór hon so út at arbeiða aftur og fekk starv sum dagligur leiðari og bókhaldari á bensinstøðini Shell Quick Service á Stongunum.

## Alma Petersen 70 ár



Í dag fyllir Alma Peteresen úr Klaksvík 70 ár.

Alma er dóttir Gretu og Aksel Olsen. Hon er fødd og uppvaksin í Klaksvík.

Alma giftist Mikkjal Lenus úr Fugloy í 1956. Tey búsettust í Víkunum, og fingu tey fýra børn. Katrin, Gretu, Eliesar, sum andaðist í 1998, og Aksel.

Seinni fluttu tey oman á Stoksoyraveg, har Alma hevði handil í kjallaranum í eini 15 ár. Hon ynskti at hava handilin í kjallaranum, so hon slapp frá at fara út frá børnunum, tá hon skuldi til arbeiðis.

Hóast komin upp í árini, so situr hon ikki hendur í favn. Alma er altíð í gongd. Tað hendir allatíðina okkurt, tá hon er í nánd. Tað skal vera ferð á, og tað er ikki nakað, sum eitur, at tað ikki ber til. Alt ber til í hennara verð. Og tað hevur sást aftur í hennara livihátti. Hon er helst mest kend fyri sítt ótroyttiliga arbeiði innan Klaksvíkar Húsmøðrafelag, har hon framvegis er limur.

Í dag seymar hon kitlar og onnur arbeiðsklæði fyri virkir og sjúkrahúsið.

Almu verður ynskt hjartaliga til lukku við runda degnum og góðan byrð framyvir.

**Børnini**

## Annette Spange Davidsen 40 ár

23. september 1963 var Annette Spange Larsen fødd í útjaðaranum av Keypmannahavn (takk fyri tað). Foreldur hennara vóru Jóna Larsen, fødd í Brekkunum, ættað úr Hósvík og Rolf Spange Larsen, ættaður úr Bagsværd í Danmark.

Annette vaks upp í Danmark, gekk í dansiskúla, ríðingarskúla, seglklubba, sang við barnakóri o.m.a. Í 1977, tá hon var 14 ára gomul, gjørdu foreldur hennara av at flyta heim til Føroyar.

Annette fekk realprógv á Felagsskúlanum á Oyrabakka í 1980, fekk FHS-prógv í 1985 og læruplláss hjá Tummas Ørv. Aftaná lokna lærutíð í 1987 var hon sett í starv sum bókhaldari hjá P/F Norðsetur. Sama árið bygdi hon sær hús í Hósvík. Annette starvaðist frá 1993 til 1996 sum bókhaldari á flakavirkinum Klinkuni í Hósvík. Í 1997 varð hon sett í starv sum bókhaldari á Rækju- & Skeljavirkinum O. C. Joensen á Oyri, í 2000 bleiv hon skrivstovuleiðari í somu fyritøku, har hon enn hevur sína dagliga gongd.



Í 1990 giftist Annette við mær, Brestir Davidsen, sonur Jytte & Ove Davidsen í Hósvík, saman hava vit børnini Karinu og Kennet.

Annette er ein "handy-kvinna", hon hevur riðið kapp, smíðað hús, lakkerað bilar, verið barrvørur, lagt flisar o.m.a. Hon hevur grønar fingrar. At leiða, at sam- og fyriskipa liggur sera væl fyri, og hon elskar at syngja. Síðani hon var lítil, hevur hon sungið nógv. Hon hevur sungið í kórið í Havn í nógv ár, verið forsangari í Rockbólkinum "Rockwall", kórsangari í rockbólkinum "Chase", er 4. limurin í swing-kvartettini SISQ. Tá tað i 1995 varð heitt á Annette & Árna av Reyni um at byrja eitt barnakór í Hósvík, var hon beinanvegin klár. Barnakórið var sett á stovn og seinni byrjaði eisini eitt baby- og eitt ungdómskór. Á hvørjum ári skipar hon fyri Luciagongd fyri pensionistunum í Norðstreymi og bygdarfólkinum í Hósvík. Hóast Annette nú er 40 ár, er rock-tónleikurin og sangurin ikki lagdur til viks, hon elskar at "jamma".

Góða kona og mamma vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 40 ára degnum, takk fyri alt tú ert fyri okkum, muss og klemm.

**Maður tín og børnini**




## Dagurin

**23. september. Linus,** deyður í árinum 79. Var fyrsti eftirmaður Pæturs á pávastóli í Róm. Halgisøgur siga, at hetta er tann Linus, sum nevndur er í 2. Tim. 4, 21, men tað vita teir so ikki við vissu.

Dagurin er eisini *heystjavndøgur.*